# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Elsebeth Andreasen 50 ár



Hósdagin 17. november fyllir Elsebeth Andreasen í Havn 50 ár. Elsebeth er best kend frá Idé Møblar, har hon hevur starvast í meira enn helvtina av lívi sínum.

Elsebeth er fødd og uppvaksin á Eiði. Hon flutti til Havnar í 1971, har hon fekk starv á bommvirkinum hjá Frants Restorff. Hon arbeiddi seinni á reinsarínum Ruba og Radio-el. Eisini arbeiddi hon í nøkur ár á posthúsinum í Havn, til hon saman við manninum í 1979 stovnaði handlilsfyritøkuna Idé Møblar, sum kundi halda 25 ára jubileum í fjør.

Tá ógvusliga fíggjarkreppan rakti føroyska búskapin fyrst í 90-unum, fór Idé Møblar, sum so nógvar aðrar fyritøkur, á húsagang í 1990. Eftir húsagangin tók Elsebeth róður í hond og byrjaði aftur á várið í 1991, og bleiv hon stjóri í fyritøkuni, og er hon tað enn.

Hetta hevur hon klárað meistarliga. Upp á rekordtíð hevur hon á sín stilla og lítlætna hátt, saman við manninum, leitt fyritøkuna burtur úr nærum ongum til at verða millum sterkastu og best riknu handilsfyritøkur í landinum í dag.

Elsebeth hevur góð evnir sum leiðari, hon er skilagóð, trúføst, álítandi og miðvís í øllum tí, sum hon tekst við, tí føla starvsfólkini, og øll sum hon annars samstarvar við, seg trygg saman við henni og trívast eisini sera væl undir hennara leiðslu. Eisini viðskiftafólkini eru glað og føla seg væl at koma at keypa í fyritøkuni. Besta prógv um hetta er, at viðskiftafólkini hava valt fyritøkuna til ársins handil 3 ár á rað.

Elsebeth er ein Gudsóttandi kvinna, og hevur hon Hann við í øllum teimum avgerðum, sum hon tekur. Hon er heldur heldur ikki bangin fyri at geva Honum heiðurin fyri tann viðvind, sum henni og hennara hava verið fyri, eisini síðani kreppuna.

Nógv minnast hana enn, eftir húsagangin í 1990, har hon saman við eldru dóttrini í kavanum stóð í gongugøtuni í Havn og seldi jólatrø. Ja, tað er nærmast eitt undur, tann mennig og viðvindur hon hevur haft og upplivað upp á so stutta tíð.

Elsebeth er eisini ógvuliga familjukær, hon gongur høgt upp í at famljan trívist og hevur tað gott. Hon er yngst av teimum trimum børnunum hjá Olbanu og Hans Jacob Eiðisgarð í Eiði. Hini systkini eru Signy Mørkøre og Thorleif Eiðisgarð, sum bæði búgva á Eiði.

Elsebeth er gift Birgiri Andreasen, ið er ættaður av Oyrabakka. Tey eiga tvær døtur: Joan, sum 24 ára gomul og býr í Keypmannahavn, og Beintu, sum er 15 ára gomul.

Føðingardagin er Elsebeth burturstødd saman við familjuni.

x.

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Hans Jacob Poulsen,** Tórshavn, fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum mikukvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum hósdagin klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini.

Tey, ið vilja Hans Jacob kunnu lata Pleygudeildini eina gávu. Konto Føroya Banka.

**Isabella Hansen,** Toftir, fer til gravar úr Nebo hósdagin 17. november klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Isabellu, kunnu lata eina peningagávu til Nebo. Konto í Føroya Sparikassa.

**Petur Juul Isaksen,** Klaksvík, andaðist mánadagin 14. november, 72 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi heim í Kristianskirkjuni mikukvøldið klokkan 19. Jarðarferðin verður úr Kristianskirkjuni hósdagin klokkan 13.

Kistan við **Hans David Petersen** av Viðareiði fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi mikukvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Viðareiðis kirkju hósdagin klokkan 13.30. Tey, ið vilja minnast Hans David kunnu lata eina peningagávu á konto í Norðoya Sparikassa.

Kistan við Hannu Hansen í Kálvalíð í Miðvági fer frá Landssjúkrahúskapellinum í dag klokkan 16 í Miðvágs kirkju.

Jarðarferðin verður hósdagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Honnu kunnu lata eina gávu á konto í Føroya Sparikassa.

**Eyðfinn Tummasarson Jacobsen** úr Havn andaðist á Láargarði 15. november, 64 ára gamal. Kistan fer av Lágargarði hósdagin klokkan 17.

Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

## Seytjan kvinnur og fimm menn bjóða seg fram

ELDRARÁÐIÐ
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tann 29. november kl 12 verður greitt, hvør skal manna tað fyrsta eldraráðið í Havn. Borgarar í kommununi, sum eru fyltir 60 ár, hava valrætt, og tey hava øll fingið bræv frá býráðnum og kunnu atkvøða við brævatkvøðu fram tilo 29. november á middegi.

Týsdagin var valdunfur í útvarpshøllini í Havn, har valevnini engdur við fleiri eldraíbúðum, betrii møguleika at skifta stóru húsini út við smáar íbúðri, ókeypis tann- og heilsurøkt til eldri og betri kavarudding á gongubreytum.

17 valevni bjóða seg fram til edlraráðið, sum situr fýra ár í senn. Fyrsta eldraráðið situr tó til 31. desember 2008. Av teimum 17 valevnunum eru 12 kvinnur og fimm menn.



*Nógv fólk var á valfundinum í útvarpshøllini týsdagin. Katrin Dahl Jakobsen, forkvinna í sosialu nevnd hjá Tórshavnar býráð setti fundin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Dagurin í morgin**

**17. november. Anianus,** deyður ár 453. Var abbati í kleystrinum Orgerils, nærhendis Orleans, har hann seinni gjørdist biskupur.





HJÁLP TIL AT FESTA HUGSAN Á BLAÐ
Føðingardagar · Starvsdagar · Minningarorð

**Fært tú ikki tikið teg saman?**

Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin "Nøvn í vikuni" Tel.341800 / 216135 Teldupost: maggi@sosialurin.fo

# Litmyndir av brúðarpørum í Vikuskiftis Sosialurin

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**